# Gransking og nýmenning

TINGHELLUANALYSAN
*Bogi Eliasen, cand.scient.pol*



Gransking og nýmenning eru nevnd sum ein av hornasteinunum í Visjón 2015, og hava í mong ár verið tikin fram sum økir, ið mugu raðfestast. Seinastu tvey árini er alsamt meira fokus sett á gransking og nýmenning og eru eisini politiskar ætlanir settar í verk. Eitt nú við ætlanini um at gera ein granskingardepil. Men eisini er kikarin settur á, hvussu nógv fíggjarlig orka skal brúkast til endamálið, um vit skulu upp á eitt norðurlendsk støði. Her valdar stórur ótryggleiki, tí vit vita ikki nágreiniliga hvat verður brúkt í Føroyum, men metingar siga at talan er um eini 0,6% av BTÚ. Málið í Visjón 2015 er 3%. Talan er ikki um, at tað almenna skal fíggja alt, men vónin er at tað privata, ella vinnan, fíggjar helvtina í teirri egnu stremban eftir nýmenning og vinningi. Royndirnar frá grannalondunum vísa, at besta úrslitið er, tá tað privata eisini tekur á seg sín part av uppgávuni.



*Mentamálaráðharrin er sera fegin um, at Føroyar nú helst gerast av granskingarsamstarvinum í ES.*

## Verkætlanir

Tað er altavgerðandi, at vit beinanvegin hugsa út um landoddarnar í okkara tráan eftir gransking og nýmenning. Sjálvandi skulu vit taka støðið í okkum sjálvum og leggja dent á okkara styrkir, men vit skulu eisini leggja okkum eftir samstarvi. Gransking og nýmenning er sjálv ímyndin av alheimsgerðini. Tað ræður um at fáa gransking í Føroyum, men eisini at verða partur av størri altjóða verkætlanum og at fáa útlenskt fíggjaðar verkætlanir hendan vegin. Tað er eingin ivi, at royndirnar, at gerast partur av Útbúgvingar og Granskingarsamstarvið hjá ES, er eitt risafet, og nú tað er líkt til at Føroyar kunnu gerast partur av 7 rammuavtaluni fyri gransking, gera vit eitt stórt lop. Vit eiga granskarar á altjóða støði, sum hava havt trupult at sleppa at luttaka í altjóða verkætlanum, tí Føroyar ikki er partur av hesum samstarvi. Sjálvt um hetta er eitt risastig, er talan samstundis um eitt stig, sum krevur miðvíst arbeiði og raðfesting, um vit sum tjóð skulu fáa sum mest burturúr. Og samstundis er eisini neyðugt ikki bert at hyggja eftir møguleikunum í hesum.



*Sendimaður okkara í Brússel Hákun J. Djurhuus hevur arbeitt hart fyri at Føroyar kemur uppí granskingarsamstarv í ES.*

## Hyggja aðrastaðir

Her eiga vit tilætlað alla tíðina eisini at hyggja út um landoddarnar. Vit hava t.d. atgongd til norðurlenska og arktiska samstarvi, sum eisini letur dyr upp. Tað er neyvan av tilvild, at ferðin í Brússel eisini bleiv brúkt til at vitja íslendsku sendistovuna, tí júst íslendingar hava seinastu tíggju árini megnað at fingið sera nógv burtur úr gransking. Umframt at leggja seg eftir granskingarsamstarvi í altjóða felagsskapum, er eisini neyðugt miðvíst at finna sær samstarvslond og hava beinleiðis tvílanda samstarv á økjum við felags áhuga. Her ber til at brúka altjóða felagsskapir at skapa sambond, eitt nú eru Russland, Kanada og USA við í Arktiska ráðnum.

## Eitt tilætlaður politikkur

Stóra avbjóðingin nú er ein langtíðar tilætlaður granskingarpolitikkur, sum ikki verður kastaður fyri borð, tí at meirlutin á Løgtingi skiftir lit. Tilgongdin nú er raðfesting, sum helst skal byggja á eina semju í politisku skipanini við bæði granskingarpartin og fíggjarligu aktørarnar, sum helst eisini skulu taka sína ábyrd. Nú er støðan komin at avgerða hvørja gransking vit skulu leggja okkum eftir og hví. Hvat fyri samfelag ynskja vit og hvørjari gransking skulu vit serliga leggja okkum eftir? Øll granskingin skal ikki bindast, men eitt fokus á nøkur kjarnuøkir, sum fast verður hildið um, er alneyðugt fyri at flyta okkum fram millum tey fremstu á einstøku økjunum.

## Vinnan

Stóra takið er eisini at sannføra vinnuna, at hon eisini skal átaka sær sín part av granskingini. Málið fyri 2015 er jú, at vinnan fíggjar helvtina av granskini. Í hesum sambandi er føroyski trupulleikin, at okkara fyritøkur eru rættiliga smáar og tí ikki hava somu møguleikar at seta fíggjarliga orku til gransking og nýmenning. Tí skal vinnan

*Alneyðugt er, at politisku flokkarnir semjast um ein langíðar granskingarpolitik og at leisturin fær stuðul frá vinnuni*

